

*Norðlýsið – sæð innan úr hellinum*



*Norðlýsið bíðar, meðan Birgir er »inni í Hestoynni« við ferðafólki…*

*Framhald av síðu 23*

Teir mest umtøktu túrarnar eru teir til Stóru Dímun og Heystoynna. Skipað verður eisini fyri hellukonsertum, og eisini verða kavaratúrar og fiskitúrar gjørdir. Fyri at fara á kavaratúr skal ein hava royndir í at kava, men fiskitúrarnar eru fyri øll, bæði børn og vaksin, roynd sum



*Birgir Enni í gummibátinum inni í hellinum í Hestoynni*

óroynd. Hetta er fyrsta árið, at Birgir roynir seg við fiskitúrum, men hevur undirtøkan verið góð higartil. Túrarnir, ið verða lýstir í útvarpinum, verða vanliga skjótt teknaðir. Sluppin tekur 50 fólk, og vanliga eru 30-40 við hvønn túrin, og farið verður altíð til teir lýstu túrarnar. »Eingin skal fara skuffaður«, sigur Birgir, og hevur hann onkuntíð gjørt útferðir við einans 2-3 fólkum.

Hóast Birgir hevur eina plan um, hvussu túrarnir skulu skipast, er tað veðrið, ið ræður, hvørji støð hann fer til. Fólk vilja helst hava pent veður ein sovorðnan túr, men er veðrið ikki til vildar, kann tað oyðileggja nakað av upplivilsinum. Føroyingar plaga at spyrja seg fyri um veðurlíkindi, men útlendingar leggja ikki so nógv í, um tað regnar ella er eitt sindur av mjørka. »Teir síggja tað sum ein part av sjarmuni«, sigur Birgir, ið heldur, at slíkt veður er ein partur av náttúruni og eisini er eitt upplivilsi fyri seg. Er veðrið ringt, plagar hann tó ikki at fara. Tað er ikki so stuttligt at liggja við sjóverki, tá ein fer ein slíkan túr: »Og er ættin ring til tann planlagda Dímunartúrin, er hon kanska góð til at fara onkra aðrastaðni«. Ikki altíð ber til at hava eina fasta rutu, og man noyðist at sigla eftir, hvussu líkindini eru. Hvussu streymur og ætt er, sær hann á Álmanakkanum, sum hann støðugt tekur framm og blaðar í, tá ið hann planleggur túrarnir.

Á einum slíkum túri verður ofta farið í land. Man skal orka at ganga. Serliga á Stóru Dímun, tá farið verður inn á Rakhellu kann vera eitt sindur tungligt, men fólk plaga at orka væl, og tað er upp á ongan máta vandamikið. Ein slíkur túrur varir ein heilan dag, eini 10 tímar viðhvørt. Birgir plagar at gera suppu e.t. til gestirnar, men best er at hava okkurt etandi við eisini. Onkuntíð verður tó heitt á hann at gera mat til fólkini, og tá borðreiður hann við sjómati. Fólk plaga annars eisini at taka føroyskan mat við; skerpikjøt og turrur fiskur verður vanliga etið umborð, og soleiðis gerst ein slíkur túrur eitt føroyskt upplivilsi í allar mátar.

Birgir heldur, at nógv meira kundi verið gjørt burturúr slíkum túrum. Fólki dámar tað væl, og tað hevði kanska verið eitt hugskot at gjørt longri túrar, har man silgdi einar 2-3 dagar, har fólk kundu búð umborð og sæð meira av Føroyum. Tað kundi væl verið meir av slíkum túrum, men heldur hann eisini, at ferðavinnan er nógv batnað, síðan hann byrjaði at sigla. Tað eru fleiri tiltøk nú. Skipað verður ofta fyri gongutúrum og túrum til Vestmannabjørgini. Hetta heldur hann verða gott, tí nógv av ferðafólkunum koma fyri at uppliva náttúruna, og tað vísir seg, at eisini føroyingum dáma væl at síggja landið á henda hátt.

## Tónleikur

Tað er umráðandi, at túrarnir ikki líkjast ov nógv. Tí roynir Birgir at variera tær ymsu útferðirnar. Í 1995 fann hann uppá at skipa fyri konsertum í samband við túrarnar. Hann hevði verið inni í hellum, bæði í Heystoynni og Nólsoy, og saman við Kristiani Blak fór hann so at skipa fyri konsertum í Klæmntsgjógv. Ljóðið inni í hellunum er heilt serstakt, heldur hann. Náttúran hevur so nógv ljóð, og inni í hellunum hoyrist bæði havið og fuglaljóð. Akkustikkurin er nakað heilt fyri seg, og bleiv hetta skjótt ein fastur táttur av tiltakinum »Summartónar«. Tríggjar fløgur eru útkomnar í samband við hellukonsertirnar, og serliga fløgan »Klæmint« er væl umtókt. Kápumyndirnar á fløgunum hevur skiparin sjálvur tikið, og tað vísir seg, at hann er ein framúr góður myndamaður. Hann tekur nógvar myndir á túrunum, og tað ber til hjá fólki at ogna sær fløgur (CD-ROM) við myndum aftan á eina slíka útferð. Á fløguni hevur hann lagt tónleik frá konsertunum, og eisini er kunning um skipið og um Føroyar – á enskum, so ferðafólkið eisini fær nakað burturúr.

Ungi sangarin Brandur Enni hevur onkuntíð verið umborð og sungið og spælt horn, og var hetta eisini byrjanin til, at hann fór at syngja og upptraðka. Birgir er pápabeiggi Brand, og var tað hann, ið hjálpti honum á veg inn í tónleikaraheimin.

## Sjómatur

Umframt at verða maskinsmiður, vinnukavari og skipari á Norðlýsinum, er Birgir eisini kendur fyri sín góða og vælumtókta sjómat: »Gott tilfar er í sjónum«, tekur hann til, og greiðir frá, hvussu hann ígjøgnum 30 ár sum vinnukavari hevur sæð, hvussu nógv lív er í havinum. Hann heldur, at vit







*Norðlýsið er ein vanlig summarsjón við Bursatanga í Havn*

hava lyndi til at gera ov lítið burturúr matinum í Føroyum. »Kókaður fiskur er eisini góður matur, men vit hava so nógv annað, og spell er, um tað ikki verður nýtt, tí sjógvurin er reinur og hevur nógv gott at bjóða«. Birgir nýtir øður, tara, krabba, skeljar o.a, sum hann sjálvur kavar eftir, og hevur hervið prógvað, at føroyskur matur kann vera meira enn kókaður fiskur við óflustum eplum.

Birgir hevur fingið gott orð á seg sum kokkur, og hevur hann onkuntíð verið á skúlum og undirvíst í matgerð, og eisini gjørdi hann mat til eina Oljustevnu í Stavanger fyrr í ár. Heitt verður á hann at kokkast til ymisk tiltøk, og herfyri gjørdi hann mat til sjálvan Anders Fogh, forsætisráðharra, tá hann var a vitjan í Føroyum.

## Virksemið

Birgir dámar væl at vísa fólki runt í landinum. Tað er stuttligt at hitta so nógv ymisk fólk. Bæði útlendingar og føroyingar hava verið sera áhugaðir í hesum túrunum, og ofta upplivir hann, at fólk koma aftur, sum hava verið útferð við »Norðlýsinum«, og tað ger tað hugaligt at halda á fram.

At hava slíkt virksemi er tó ikki bara stuttligt. Tað tekur nógv ár at byggja upp, og tað skal ótrúliga nógv orka til viðlíkahald, planlegging og annað, og í summarmánaðunum er út at gera. Um veturin liggur »Norðlýsið« stilt, og tá fer tíðin við at umvæla og annars fáast við annað enn sigling.

Niðri í lugarinum hevur Birgir alt tað, ið einum tørvar til at røkja virksemið hjá sær. Ímeðan hann vísir mær myndir á farteldum, riggar ungi amerikumaðurin Nathaniel, ið seinasta mánaðin hevur starvast umborð, av. Hann fer til Íslands at arbeiða eina tíð, og Birgir fortelur, at ein dani kemur at arbeiða umborð tær komandi tvær vikurnar. Vanliga eru teir tveir mans umborð, Birgir stendur sjálvur fyri maskinum og navigatión, og so er ein, sum er dekkari og annars hjálpir til. Um summarið er tó ikki so galið við einum eykamanni, og tá er ikki óvanligt, at onkur kemur og biður sær arbeiði umborð.

Birgir er næstan klárur til næsta túrin. Hann skiftivís rørir í suppuni, ið stendur og kókar, og tosar við Nathaniel og meg. Telefonin ringir eisini av og á, og samstundis vísir hann mær heimasíðuna hjá sær, har ein kann lesa um útferðirnar, síggja myndir og annars lesa um »Norðlýsið« og annað, ið Birgir tekst við. Her hevur hann allar nýmótans hentleikar, bæði telduna, internet, fartelefon og digitalt myndatól. At eitt heilt virksemi kann fylla so lítið! Men hóast nýmótans tøkni, umvælingar, og hvørt av sínum, er »Norðlýsið« samstundis sera væl varðveitt sum eitt gamalt seglskip. Søgan er ikki farin fyri tað, um tíðirnar broytast, og tað er stuttligt at síggja. Vit kunnu øll vera errin um, at vit enn hava eitt skip av hesum slag, sum bæði prýðir høvðsstaðin, og sum sýnir Føroyar á ein so vakran hátt.

